# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.02.2015*

**Bygdaráðsfundur 23.02.2015 kl. 17.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 6/2015 Fíggjarmál**
J.nr. 2015-0023-0163
**Málslýsing**
Bygdabókasavnið í Nes kommunu hevur sín egna roknskap og bókhald. Samb. Fíggjarmálaráðnum, og grannskoðarinum hjá Nes kommunu, so hava flest allar kommunur, bygdabókasavnið inni í tí kommunala bókhaldinum og roknskapinum.

Fyrisitingin mælir til, at Nes kommuna fylgir mannagongdini sum aðrar kommunur brúka, og sum Fíggjarmálaráðið og grannskoðarin mæla til.

**Tilmæli**
Á fundi 17.02.2015 mælir Fíggjarnevndin til, at roknskapurin hjá Bygdabókasavninum verður inni í tí kommunala bókhaldinum og roknskapinum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 7/2015 Mentanarmál**
J.nr. 2015-0023-0160
**Málslýsing**
Í skrivi 22.01.2015 søkir Tofta Talvfelag um fíggjarligan stuðul til felagið, eins og kommunan hevur gjørt undanfarin ár.

**Tilmælir**
Á fundi 10.02.2015 mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul til Tofta Talvfelag áljóðandi kr. 12.000,00 fyri 2015.

Á fundi 17.02.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin er avsettur á fíggjarætlanini fyri 2015.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 8/2015 Mentanarmál**
J.nr. 2015-0023-0161
**Málslýsing**
Í skrivi 23.01.2015 søkir Fornminnisfelagið í Nes kommunu um fíggjarligan stuðul til virksemið hjá felagnum, eins og kommunan hevur gjørt undanfarin ár.

**Tilmælir**
Á fundi 10.02.2015 mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul til Fornminnisfelagið áljóðandi kr. 100.000,00 fyri 2015.

Á fundi 17.02.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini. Peningurin er avsettur á fíggjarætlanini fyri 2015.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2015 Mentanarmál**
J.nr. 2015-0019-0073
**Málslýsing**
Í skrivið 27.01.2015 søkir Projektkór 15 v/ Ólavur Hátún um fíggjarligan stuðul, í samb. við ætlaðun framførðsluna av Jóhannespassiónini eftir J.C. Bach.

**Tilmælir**
Á fundi 10.02.2015 mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul til Projektkór 15 áljóðandi kr. 15.000,00.

Á fundi 17.02.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto stuðul mentan.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.02.2015*

**Mál nr. 10/2015 Jarðarmál**

J. nr. 2015-0042-0343

**Málslýsing**

Í skrivi 15.01.2015 søkir Demich, vegna Regin Debess, Høganesvegur 73, um loyvi til at fáa bora eitt hol til jarðhita til sethús hansara á matr. nr. 746n.

**Tilmæli**

Á fundi 10.02.2015 mælir Tekniska nevnd til, at Regin Debess fær loyvi til at bora eitt hol til jarðhita til sethúsini, inni á matr. nr. 746n, og at arbeiðið verður gjørt eftir viðmæli frá Jarðfeingi.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 11/2015 Byggimál**

J.nr. 2015-0042-0344

**Málslýsing**

Í skrivi 29.01.2015 søkja Hans Asbjørn Eysturdal og Torborg Hansen, um loyvi at at grava út, til uppíbygging omanfyri sethús teirra, Brekkuvegur 12, matr. nr. 442, og til innkoyring til bilhús, á sunnara enda á garðinum niðanfyri sethúsini.

Í umsóknini verður eisini biðið um loyvi til uppíbygging til sethúsini matr nr. 442, og til at byggja bilhús niðanfyri

**Tilmæli**

Á fundi 10.02.2015 mælir Tekniska nevnd til, at Hans Asbjørn Eysturdal og Torborg Hansen fáa gravi- og byggiloyvi eftir ávísum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 12/2015 Byggimál**

J.nr. 2007-0042-0185

**Málslýsing**

Í skrivi 05.02.2015 søkir Rógvi Nolsøe Hansen um loyvi til at grava út fyri sethúsum á Gaddavegi 18, matr. nr. 699b.

Í umsóknini verður eisini biðið um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699b, samb. innsendu tekningum.

**Tilmæli**
Á fundi 10.02.2015 mælir Tekniska nevnd til, at Rógvi Nolsøe Hansen fær gravi- og byggiloyviloyvi eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 13/2015 Trivnaðarmál**
J.nr. 2014-0023-0152
**Málslýsing**
Í skriv 17.12.2014 søkir Ungdómshúsið á Toftum um eyka stuðul, til rindan av helvtini av kostnaðinum, fyri innrætting av hølum til "biograf", sum hevur kostað teimum kr. 17.000,00.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2015 mælir Trivnaðarnevndin til at játta stuðul til Ungdómshúsið á kr. 8.500,00.

Á fundi 17.02.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto stovnurin Ungdómshúsið.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.